# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Stór framsýning av 50 ára søguni hjá NSÍ




**FRAMSÝNING**
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin 28. oktober kl. 16.00 letur upp ein sera spennandi framsýning um søguna hjá ítróttarfelagnum NSÍ í Heiðahúsinum í Saltangará. Framsýningin er ein liður í teimum ymisku hátíðarhaldunum hjá felagnum, í samband við at NSÍ í ár hevur 50 ár á baki. Fyrireikararnir av framsýningini hildu tað verða sera væl hóskandi at leggja hesa áhugaverdu framsýningina í árligu mentunarvikuni hjá Runavíkar Kommunu, sum eisini fellur saman við stóru vinnustevnuni Faroexpo.

Framsýningin verður soleiðis í tíðarskeiðnum 28. oktober til og við 4. november, og kemur hon at verða opin allar dagarnar frá kl. 17.00 til 20.00, tó byrjar hon tann fyrsta dagin kl.16.00 við móttøku.

Í høvuðsheitum kemur talan at verða um eina fjølbroytta myndaframsýning, sum kemur at lýsa øll hesi fyrstu 50 árini hjá felagnum. Harafturat verður eisini ymiskt annað sera áhugavert at síggja, so sum gamlir búnar, brot úr gerðabókum, v.m. Hvønn dag meðan framsýningin koyrir, kemur hon eisini at fáa vitjan av gomlum, sum ungum, kendum NSÍ'arum

Fyrireikararnir hava longu megnað at fingið til vega heilt fitt av tilfari frá fólkinum á staðnum, men ynskja framhaldandi at útvega sær meiri tilfar, so framsýningin kann gerast so góð og fullfíggjað sum tilber, og heita fyrireikararnir tí framvegis á tey sum liggja inni við áhugaverdum tilfari í samband við søguna hjá NSÍ, um at seta seg í samband við seg, og kann hetta gerast við at ringja á tlf. 223184 Tey sum eisini vita um okkurt, sum tey meta eigur at verða ein partur av hesi framsýningini, eru eisini vælkomin at ringja.

Fyrireikararnir ivast onga løtu í at framsýningin av 50 ára søguni hjá NSÍ kemur at verða væl vitjað, eins og teir heldur ikki ivast í, at tey sum vitja koma at fáa eitt gott upplivilsi. Framsýningin er ókeypis.

## FM í Býarkoyring verður leygardagin

**SÚKKLING**
*Tíðindaskriv*

FM í Býarkoyring verður leygardagin komandi. Møguleiki verður hjá børnum og vaksnum at kappast um FM heitið. Kappingin verður í Hoyvík

Leygarmorguninklokkan átta verður kappast um FM heitið hjá teimum vaksnu og eftir at øll eru komin á mál, sleppa børn at royna seg. Hetta verður klokkan tíggju.

Børnini kunnu tilmelda seg á staðnum, tvs. við nýggju kirkjuna í Hoyvík, meðan tey vaksnu skulu melda til á heimasíðuni hjá Tórshavnar Súkklufelag, ið er www.tsf.fo

# Suðuroyar Svimjifelag til kapping í Greve

**TÍÐINDASKRIV:**

Suðuroyar Svimjifelag fer at taka lut í Danmark meistaraheitinum í 25 metur hyli, ið verður seinni í mánaðinum.

SUSVIM verður at luttaka við 5 svimjarum. Tey eru:

Shaila Millum Garðarnar, Danjal Martin Hoffgaard, Pál Joensen, Mona Simonsen og Malan Vitalis Bærendsen. Við svimjarunum verður høvuðsvenjarin Jón Bjarnason.

Kappingin verður hildin í Greve 25 til 28 oktobur og luttaka um 500 svimjarar frá 68 feløgum, 66 Donsk, SUSVIM úr Føroyum og íslendingar verða eisini við.

Til tey ið hava møguleika at fara til kappingina, skal upplýsast at kappingin er í

Greve Svømmehal
Jørgen Bachs Plads 1
2670 Greve
Danmark

At senda svimjarar til kapping uttanlands, er ein liður í menningini av okkara svimjarum, so vit eisini framhaldandi kunnu verða á ovastu rók hvat svimjing viðvíkur í Føroyum

Ferðalagið fer úr Føroyum 24. og verða heima aftur 29. okt.

Vit á susvim.com verða sjálvandi at fylgja við og verða úrslit og annað at finna á heimasíðuni hjá felagnum.

Stuðlað túrinum hava: Suðuroyar Sparikassi, Rock trawl-doors og Faroe Farming.




*SUSVIM-liðið, ið fer við til kappingina í Greve*